## Frits í Listaglugganum

Leygardagin kl. 15 letur listamaðurin, Frits Johannesen úr Fuglafirði upp eina framsýning í Listaglugganum í Havn. Á sýningini hevur hann bæði málningar og tekningar.



## Nógv færri partrolarar undir Føroyum

Djúpvatnstrolararnir fiska upsa og verða vantandi inni gjøgnum alla vikuna. Partrolararnir fáa minni av fiski nú, men onkur av teimum letur tó væl at. Tað sær gott út í sjónum. Frá hálvum september og allan oktober mánað varð ikki roynandi fyri illveður. Tað er nógv minni av partrolarum ið royna undir Føroyum nú. Tað liggja ikki minni enn 10 trolarar í løtuni. Teir smærru trolbátarnir fiska havtasku á Skeivabanka og eystanfyri. Hesir trolararnir fingu lítið av fiski í summar.

# Løgreglan vil hava DNA

**Høvdu vit sloppið at gjørt eina DNA skráseting í Føroyum, hevði tað havt ómetaliga stóran týdning fyri okkum, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni**

LØGREGLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað hevði fingið ein ómetalig stóran týdning fyri okkara arbeiði at uppklára brotsverk.

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni í Føroyum, sigur, at tað heilt avgjørt stendur ógvuliga ovarliga á ynskilistanum hjá løgregluni at fáa loyvi til at gera eina DNA skráseting í Føroyum, har DNA royndir av álvarsligum brotsverkum verða goymdar.

- Vit hava dúvað upp á fingramerki í fleiri mansaldrar, men tá ið DNA royndirnar komu fram, varð tað eitt satt gjøgnumbrot í arbeiðnum hjá løgregluni.

- Vit vóna sostatt eisini, at vit fáa hendan møguleikan í Føroyum, tí tað gevur okkum heilt aðrar møguleikar at eyðmerkja lógbrótarar.

Hann sigur, at sum støðan er nú, hevur løgreglan heimild at taka DNA royndir, men trupulleikin er, at lógin forðar fyri, at tær verða skrásettar og goymdar.

Bergleif Brimvík sigur, at í Danmark hevur DNA skrásetingin hjálpt løgregluni til at uppklára eitt hav av brotsverkum.

Hann nevnir eitt dømi um ein mann, sum fyri kortum varð tikin fyri eitt lítisvert brotsverk.

- DNA roynd varð tikin av honum og tá kom løgreglan eftir, at royndin samsvaraði við eina DNA roynd, sum varð tikin í einum álvarsligum bankaráni fyri átta árum síðani.

- Í bankaráninum hevði løgreglan tryggjað sær DNA roynd av brotsmanninum og hon varð goymd í skrásetingini og tað feldi altso brotsmannin átta ár seinni.

Ein slíkan møguleika hevur løgreglan í Føroyum ikki.

-Tað er ein stór forðing fyri okkara arbeiði at uppklára brotsverk og eg ivist ikki í, at tað eru brotsverk, sum ongantíð verða uppklárað av tí sama, sigur leiðarin á kriminaldeildini hjá løgregluni.

DNA royndir verða bara goymdar í sambandi við lutfalsliga álvarslig brotsverk, har revsingin hevði verið minst hálvtannað árs fongsul.

Tað vil siga í sambandi við álvarsligan harðskap, morð, neyðtøku og annað slíkt.

Bergleif Brimvík sigur, at í donsku DNA skrásetingini eru 35000 fólk skrásett og eini 10.000-15000 fólk verða skrásett um árið.

- Í 2004 vóru førdi danska DNA skrásetingin til, at 475 brotsverk vórðu uppklárað, í 2005 var talið 604 , í 2006 var talan um 833 brotsverk og í fjør vóru 2040 brotsverk uppklárað við støði í donsku DNA skrásetingini.

Av teimum var í 10 førum talan um rættiliga grov brotsverk.

- Sostatt er talið á brotsverkum í Danmark, sum eru uppklárað við hjálp av DNA skrásetingini, fimm faldað seinastu fýra árini.

- Okkara tilmæli er avgjørt, at vit eisini fáa hendan møguleikan í Føroyum, samstundis sum rættargangslógin eisini verður dagførd, tí hon er so dyggiliga afturútsigld, sigur Bergleif Brimvík.

- Hetta hevur avgjørt nakað við rættarkensluna at gera, leggur hann afturat.



*Løgreglan í Føroyum kann nú vænta sær eitt rættiligt gjøgnumbrot í møguleikunum at uppklára neyðtøkur, bankarán, morð og onnur álvarslig brotsverk*

# Nógv truplari at vera lógbrótari í Føroyum

**Landsstýrið ætlar nú at geva løgregluni í Føroyum slóðbrótandi amboð at uppklára brotsverk við, næstu framtíð skal DNA roynd goymast av øllum, sum verða dømd fyri álvarslig brotsverk**

LØGREGLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú fer tað at verða munandi tórførari hjá lógbrótarum at goyma seg fyri løgregluni.

Tað ætlar Annika Olsen, landsstýriskvinna, sær at syrgja fyri.

Hon sigur, at hon nú fer at arbeiða fyri, at lógin verður broytt, so at tað eisini skal bera til hjá løgregluni í Føroyum at gera eina goymslu, har DNA roynd av øllum lógarbrótarum, sum hava framt grov lógarbrot, skulu skrásetast.

Í løgtinginum í gjár vildi Bergtóra Høgnadóttir Joensen, løgtingskvinna, hava av vita frá landsstýriskvinnuni, um nakað røkist fyri, at løgreglan í Føroyum eisini sleppur at gera eina goymslu, har DNA royndir verða skrásettar av øllum, sum verða dømd sek í álvarsligum brotsverkum.

Í hesi skrásetingini verða DNA roynd bara goymd av teimum, sum fáa minst hjálvtannað árs fongsul.

Talan er sostatt ikki at um at goyma DNA av hvørjum bilførara, sum koyrir við kenning, ella av hvørjum innbrotstjóvi, har talan er um smáttari.

- At taka DNA roynd av fólki hevur púra onki upp á seg, tí tað er krevst ikki meiri enn at taka ein dropa av spýtti upp á ein vattpinn.

Hon vísti á, at í øðrum londum er DNA skrásetingin eitt ómetaliga hent amboð í royndunum hjá løgregluni at loysa tórfør brotsverk, eisini brotsverk, sum annars aldrin høvdu verðið uppklárað.

### Tekur málið upp

Annika Olsen, landsstýriskvinna, sigur, at orsøkin til, at tað ikki ber til, at gera eina DNA goymslu í Føroyum, er at rættargangslógin ikki er dagførd.

Ogeftirrættargangslógini, sum nú er í gildi fyri Føroyar, er ikki loyvi at skipa eina DNA goymslu.

Annika Olsen vísti annars á, at longu í 2005 vildi fútin hava landsstýrið at taka støðu til um løgreglan í Føroyum eisini skuldi fáa møguleikan at skráseta DNA royndir og leggja tær á goymslu, men tað datt niðurfyri, tí rættargangslógin forðaði tí.

Rættargangslógin er donsk og tískil er tað fólkatingið, sum skal samtykkja broytingar hana.

Arbeitt verður við at dagføra rættargangslógina fyri Føroyar, men hóast áheitanina frá fútanum, er tann parturin, sum heimilar løgregluni at skipa eina DNA goymsla, ikki við í teimum broytingunum.

Og hon ivast í um tað ber til at fáa hendan partin við í hesum umfarinum

Annika Olsen vísti annars á, at longu í 2005 vildi fútin hava landsstýrið at taka støðu til um løgreglan í Føroyum eisini skuldi fáa møguleikan at gera eina DNA goymslu, men tað dattniðurfyri, tí rættargangslógin forðaði tí.

Men Annika Olsen staðfesti eisini, at hon er hugað fyri at geva løgregluni í Føroyum hendan møguleikan og tí fer hon seinni at heita á donsku ríkismyndugleikarnar um at gera neyðugu broytingarnar í rættargangslógini.

Annars vísti hon á, at í næstu framtíð skal hon á fund við danska ráðharran, Brian Mikkelsen og hon heldur, at hetta hevði verið eitt gylt høvi at tikið spurningin upp.

- Hetta er sera týdningarmikið og tað er uttan iva skilagott at fáa eina DNA skráseting í Føroyum.